**<u>Røða 100 ára føðingardagur hjá Mallu Berg Olsen, 3. februar 2015</u>**

Góða Malla,

Hjartaliga til lukku við føðingardegnum.

Tað er mær ein stórur heiður sum landsstýriskvinna í almannamálum at vera boðin við í føðingaradag her í dag, og tað takki eg fyri.

Eg fari eisini at ynskja familjuni, kenningum og øllum tykkum, ið dagliga eru um Mallu á eldrasambýlin Vesturskin, hjartaliga til lukku við hesum stóra hátíðardegi.

Malla, tað er torført – fyri ikki at siga ógjørligt – at ímynda sær, hvat tað vil siga at fylla 100 ár.

Viðførið tygara við upplivingum, við lívsroyndum, við innliti, er á tremur.

Tað hava verið nógvar og stórar broytingar í føroyska samfelagnum, ja, tygum kunnu minnast og hyggja aftur á eitt langt og ríkt lív.

Malla, tygara lív hevur verið fult av góðum løtum. Sum ung fóru tygum til Havnar at arbeiða á sjúkrahúsinum, og seinni ansaðu tygum børnum og hús hjá enskari familju, sum búðu úti í Tinganesi.

Meðan tygum vóru í Havn hitti tygum mann tygara, Bernhard Olsen, ið var ættaður av Toftum. Berhardur bygdi tykkum hús á Toftum, og giftust tit bæði og flutt inn í 1937.

Tygum og maðurin fingu 6 børn. Børn, ommubørn, langommubørn og enntá oldurommubarn, hava ríkað tygum lívið.

Mær er fortalt, at tygum altíð hevur verið so góð við børn, og tygum duga so frágera væl at fortelja søgur. Og í fleiri ár høvdu tygum sunnudagsskúla, og børnunum dámdu ómetliga væl at lurta, tá tygum fortaldi søgur.

Men lívið hevur ikki einans verið lætt hjá tygum. Tygum vóru einans 2 ára gomul, tá mamma tygara doyði eftir stuttari sjúkalegu frá 5 smáum børnum. Pápi tygara, ið var sjómaður, var burtur um hetta mundi. Tá hann kom heim var bara eitt at gera – tað var at fáa onkran av børnunum út til familju at vera. Soleiðis vóru tíðirnar tá, tá var eingin almenn hjálp at fáa.

Tygum flutti til ommu og abba tygara á Nesi. Tá tygum vóru 7 ára gomul, doyði omma tygara, og tá fluttu tygum saman við abbanum til sonin Jens og Sannu at búgva.

Pápi tygara segði mangan, at tað vóru tyngstu spor, hann nakrantíð hevði gingið, tá ið hann bar tygum í einum leypi norðan frá Gjógv til Skálabotn, haðani varð farið við báti út á Nes – men leypurin var tyngri at bera norður aftur tómur.

Tygum hava altíð verið ógvuliga røsk og arbeiðssom. Altíð høvdu tygum eitthvørt í hondunum, antin tað var okkurt á stokkunum, ella tygum seymaðu ella kliptu og límaðu eitthvørt. Nógv pløgg og lutir hava børnini og ommubørnini fingið frá tygum øll hesi árini, til stóra gleði og gagn.

Eisini búðu tygum heima við hús til fyri trimum árum síðan, tá tygum vóru 97 ár, og hetta uttan heimahjálp. Ikki kann sigast annað enn at hetta er fantastiskt! Tygum hava altíð sett eina æru í at klára tygum sjálv, og tað man sigast, at tygum hava víst í verki.

Eg vil eisini nýta høvið at takka tykkum øllum á eldrasambýlinum Vesturskin fyri tykkara umsorgan og nærlagni til Mallu og tey, ið búgva á Vesturskin saman við Mallu.

Eg fari at enda við kvøldarsálminum hjá Mikkjal á Ryggi "Av dagsins verki móður", sum minnir okkum á, at hóast at lívið bæði inniheldur knoss og strev, so eru vit takksom, at Guð er við okkum, og signar okkara leið.

Við hesum fari eg at ynskja tygum eitt blítt lívskvøld við tøkk fyri tíðina, sum okkum er tillutað.

"Av dagsins verki móður
eg niður leggi meg,
Takk, Guð, sum var mær góður
og vardi væl mín veg,
sum signaði mær verkið,
sum heilsu gav og mátt.
Ver hjá mær, faðir sterki,
og varðveit meg í nátt."

Takk fyri!

Annika Olsen,
landsstýriskvinna